Summar FERÐAMÁL

# HJØRDIS OG OLUFFA Í DREYMALANDI



FULLKOMIN **TØGN** VALDAÐI, TÁ IÐ FERÐALAGIÐ HJÁ **HJØRDIS HEINDRIKSDÓTTIR** OG **OLUFFU UNDIR KLETTI** HEVÐI **STRÍTT** SEG FRAM OG KUNDI SKOÐA YVIR **TOFTIRNAR** AV EINASTA VARÐVEITTA INKABÝI Í PERU. **MACHU PICCHU** ER EITT AV TEIMUM SJEY **UNDRUNUM** Í HEIMINUM



**SAMRØÐA**
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Sum ungar gentur fingu Hjørdis Heindriksdóttir og Oluffa undir Kletti hvør í sínum lagi at vita um inkabýin Machu Picchu, og síðan hava báðar droymt um at fara hagar.

Í summar gjkørdu tær dreymin til veruleika.

Fyrst til tað søguliga í heilt stuttum.

### Inkaríkið

Inkaríkið bleiv til í 12. øld. Tað byrjaði í Peru, vaks og breiddi seg víða, men ikki við hertøku. Inkaríkið var eitt av heimsins størstu og fremstu ríkjum, og leiðararnir dugdu at sameina fólkasløgini og gera brúk av dygdunum hjá hvørjum bólki.

Í 1530-árunum komu spaniólar og gjørdu innrás í Inkaríkið, sum fall í 1533.

Tað er ikki minst arkitektur og byggilist, at inkaríkið verður minst fyri. Tey dugdu so væl at laða grót, at knívur fekst ikki inn millum steinarnar.

Spaniólar komu ongantíð til býin Machu Picchu, sum hvít fólk ikki visti um fyrr enn í 1911. Toftirnar hava staðið væl vardar handan fjøllini, og hildið verður, at inkararnir sjálvir kvettu gøtuna til býin, so landnámsmenninir ikki skuldu finna hann.

### Kent ferðamál

Machu Picchu er eitt spennandi ferðamál, og fleiri ferðir verða gjørdar hagar.

Tað ber til at koma til Machu Picchu við toki og so ganga ein styttri tein til avtoftaða býin.

Men tað ber eisini til at ganga í nakrar dagar gjøgnum vøkru náttúruna høgt, høgt uppi í fjøllunum. Hetta valdu Oluffa og Hjørdis at gera. Í fýra dagar gingu tær upp um dalar og fjøll saman við ferðalagi teirra.

### Altjóða ferðalag

Tær løgdu ikki í at fara við einum donskum ferðalagi, tí tær vildu fegnar møta øðrum fólkasløgum eisini.

Tí fingu tær Fonnflog at leggja teimum flogferðinga til rættis og bíløgdu ferðina í Peru á alnótini gjøgnum eina peruianska ferðskrivstovu.

Tær flugu umvegis Keypmannahavn, Madrid, og Lima í Peru til býin Cuzco, sum var høvuðsstaður í Inkaríkinum.

Har steðgaðu tær í tríggjar dagar fyri at venja seg við tunnu luftina, tí tær skuldu longur upp enn. Býurin liggur í 3300-3500 metra hædd.

### Tunn luft

– Vit merktu væl, at luftin var tunn. Hjørdis hevði tungt við at anda, og Oluffa kendi tað, sum tá tú hevur hug at geispa.

Í Cuzco búðu tær á einum vallaraheimi og høvdu tríggjar frálíkar dagar. Fólkini á staðnum vóru blíð og heit, og tær komu eisini á tal við fólk úr øllum heiminum, tí nógv, sum vitja Peru, velja at fara til Cuzco og Machu Picchu.

Áðrenn farið varð víðari, fingu tær frágreiðing um túrin. Tær skuldu gera seg út til fýra dagar og hava sum minst at bera á rygginum.

Fyrst koyrdu tær við bussi til lítla inkabýin Ollantaytambo. Har var ein marknaður, og seljarnir áleypandi. Har kundu tær keypa tað seinasta, áðrenn gongutúrurin byrjaði. Tær fingu sær fjallstav, keyptu vatn, og tær fingu sum ráð alla tíðina at tyggja kokabløð, tí tað fyribyrgdi hæddarsjúku.

Bløðini eru ikki rúsandi, men tey styrkja og sum nevnt fyribyrgja tey hæddarsjúku.

Eitt lítið petti koyrdu tær afturat við bussi, til tær komu til eitt stað, har tær skuldu vísa pass og ferðabræv. Avmarkað er, hvussu nógv kunnu sleppa fram við har hvønn dag.

### Byrjaðu lætt

Í fyrstuni var túrurin lættur eftir gomlu inkagøtuni. Tær nutu vøkru náttúruna og komu fram við fleiri væl varðveittum toftum frá inkatíðini.

Ferðalag teirra var tveir meksikanar, tveir spaniólar, tvey úr Brasilia, tvey úr Kanada, tvær norskar kvinnur, ein hollendingur við síni peruansku konu og so tær báðar.

### Berarar

Men umframt sjálvt ferðalagið vóru tveir ferðaleiðarar og 16 menn, sum bóru alt uttan tað, sum hvør einstakur hevði við sær.

– Í sandalum fóru teir avstað við øllum: borðum, tjøldum, gassi, knívum, gaflum, mati, dúki og øðrum. Enntá høvdu teir serviettar við og borðreiddu á túrinum snøgt fyri okkum.

Tann fyrsta dagin gingu tey 11-12 kilometrar. Tá settu berararnir matarteltið og soviteltini upp.

– Vit fingu sera góðan mat frá teimum, eitt nú rís og stokt epli, høsnakjøt, spaghetti, omelett og annað gott.

### Stjørnuklárt

So skjótt sum sólin fór niður, var bølamyrkt.

– Vit hava ongantíð áður sæð so kláran stjørnuhimmal, og ferðaleiðararnir forkláraðu okkum, hvørjar myndirnar á himmalinum vóru.

Kalt var um náttina, men tær báðar svóvu sum steinar, móðar eftir langa gongutúrin.

### Fót fyri fót

Annan dagin fingu tær at vita, at ein strævin túrur stóð fyri framman.

Tær skuldu ganga upp eftir í fimm tímar og fóru at koma næstan 1000 metrar longur upp í hædd.

– Vit settu okkum fyri bara at ganga fót fyri fót, men tungt var, tí næstan allan dagin gingu vit upp gjøgnum trappur.

Oluffa var í góðari venjing, tí hon bæði rør og rennur. Hjørdis ger hvørki. Men venjing hevur lítið at siga, halda tær. Tað strævna er tunna luftin, bakandi sólin og hitin um dagin.

### Høvdu onga neyð

Einastaðni fóru tær nakað upp afturat